# Ferðamálið á eini endaleysa

**– Boðskapurin er í grundini einfaldur. Næstakærleiki, náði, harmoni, virðing fyri fleirleika, náttúru og forfedrum, andanum, gátuni, leitanini og ferðini. Loreena McKennitt er ein humanpolitiskur pasifistiskur peikifingur, skrivar Jóannes Lamhauge í hesum ummælinum av konsert hjá Loreena McKennitt í Falconer salinum í Keypmannahavn**

KONSERT
*Jóannes Lamhauge*



*Loreena McKennitt bergtók í Falkonersalinum í Keypmannahavn fyrr í ár. Kendi og fjølbroytti føroyski listamaðurin Jóannes Lamhauge var við til konsertina og skrivar inniliga og kensluborna ummælið av konsertini fyri Sosialin. Lesið eisini samrøðuna við songkvinnuna í Sosialinum seinasta hósdag*

### Loreena McKennitt

Hon er født í kanadiska býnum Manitoba í 1957, men sum navnið avdúkar, er hon av írsk-skotskum uppruna. Hon er ikki so kend her um leiðir, men í keltiskt/eklektiskum tónleika-samanhangi eigur hon nokk eitt tað viðurkendasta og virðiligasta navnið í heiminum í dag.

Sum ung genta, kom Loreena tíðliga í samband við eitt livandi og fregið fólkatónleikaumhvørvi í Winnipeg í Kanada. Hon fekk her fyrimyndir sum The Bothy Band, Steeleye Span, Planxty og serstakliga bretska hørpuleikaran Alan Stivell. Og tað gjørdist henni skjótt greitt, at hesin tónleikurin fór at vera hennara kall. Hon gjørdi av at sleppa djóralæknalesnaði sínum, og flutti til Stratford, har hon av álvara fór undir at byggja sær eina karrieru. Her treyt ikki við avbjóðingum og møguleikum hjá einum málrættaðum og dugnaligum tónleikara og eftir bert fáum árum hevði hon m.a. spælt sangleikir og skrivað tónleik til fleiri filmsverkætlanir.

Hon setti á stovn plátufelagið *Quinlan Road*, og kom í 1985 út við teirri fyrstu útgávuni, ið hon kallaði *Elemental*. Bondini seldu hampuliga væl, og tey næstu árini komu tvær útgávur við Loreenu í sølubúðurnar afturat. *To Drive the Cold Winter Away* (1987) og *Parallel Dreams* (1989). Henda seinna útgávan var hin best móttikna indie-útgávan í Kanada um tað mund-ið.

Tað stóra internationala gjøgnumbrotið kom tó í 1991 við útgávuni *The Visit*. Loreena var greið yvir, at hon var av keltiskum blóði, og var hetta als ikki nakað, sum hon hirdi burtur í tónleikinum. Men á eini vitjan í Miðevropu hetta sama árið, fekk hon veruliga eyguni upp fyri teirri keltisku mentanini og søguni.

Hon setti sær fyri at granska ta fornu og gátuføru søguna hjá keltisku forfedrum sínum á longu útflytingarferð teirra úr Mið-og Eysturevropu upp til valisisku, írsku og skotsku norðurstrendurnar. Her var nógv at fara eftir, tá tað kom til tónleikin, tí her var talan um eitt gloymt fólkaslag við eini duldarfullari men vakrari og serstakliga ríkari mentan av vitan, vísind, heimspeki, tónleiki, list, átrúnaði, sagnum og vísum.

Hetta hugtók hana somikið nógv, at tann keltiski arvurin bleiv reyði tráðurin í øllum verkum hennara eftir hetta. *The Mask and the Mirror* (1994), *A Winter Garden* (1995) *The Book of Secrets* (1997) og *An Ancient Muse* (2006)



*Stóra solonavnið Caroline Lavelle setti sín serstaka dám á kosertina við sínum undurfulla sellospæli*

Tað, at hon kom fram á keltarnar, broytti lív hennara á nógvar hættir, ikki bara listarliga men eisini andaliga. Hon byrjaði nú eina langa pílagrímsferð, har hon ferðaðist kring knøttin í fótafetum forfedrum sínum. Hon dró íblástur og hugskot úr teimum søguligu støðunum, fólkasløgunum og landsløgunum hon kom fram á, og tók við sær søgur og løg umframt ljóðføri og tónleikarar. Innihaldsliga hevði tónleikur hennara eisini tikið eina líknandi vend yvir í eina andaliga leitan eftir nøkrum undranarverdum og gandakendum, ið vit menniskju tykjast at hava mist onkustaðni á leiðini. Leitanin eftir spiritualiteti og muninum millum spiritualitet og religión er eitt høvuðstema á øllum hesum seinastu fýra útgávunum.

Hetta er world music í sínum reinasta týdningi. Sjálv kallar hon tað *Travel Music.*

### Loftkent og lokkandi

Konsertsalurin er stórur, og tá øll 1.820 fólkini hava funnið sín sess, verða ljósini doyvd heilt niður, og tað verður kvirt. Øll sita í niðuni og bíða.

Løgin ljóð koma krúpandi og leggja ein trølsligan dám á salin. Spakuliga verður tann stóri pallurin skýmingsbláur, og úr tokuni koma 13 skuggar
sníkjandi. Ein teirra setist við eina hørpu mitt á pallinum. Hesin skuggin veit, at øll hyggja at sær.

Yndisligur hørpusláttur leitar varliga út í myrkrið, hann vinnur sær treyst og síðani floymir hann vágin út í rúmið eins og kennir hann onki óreint. Tónarnir fylla rúmið, og ljósið verður heitari. Loreena situr og spælir í stakki, sum hon plagar, og hitt eyðkenda reyða hárið hongur sítt og ývið niður á bringuna.

Ein djúp sello kemur inn í ljóðmyndina, og síðani ein einsamøll violin.

Við sær á pallin í kvøld hevur Loreena fleiri heimsnøvn. Hon, ið spælir sello, er ein vøkur ljóshærd kvinna, ið eitur Caroline Lavelle. Lavelle er eitt stórt solonavn umframt at vera viðurkend í klassiskum tónleiki. Hon hevur m.a. arbeitt saman við nøvnum sum Radiohead, The Chieftains, Peter Gabriel, Vangelis, Massive Attack og Muse, men tá ið høvi býðst er hon á konsertferð við Loreenu.

Høgi og berskølluti violinisturin eitur Hugh Marsh, og hetta er ein maður, ið av álvara hevur sligið navn sítt fast, bæði sum klassiskur og modernaður tónleikari. Hesin hevur óteljandi nøvn á sínum lista, so sum Bruce Cockburn, Peter Murphy, Daniel Lanois, Michael Brecker, Bonnie Raitt, James Blood Ulmer, Flea, Gregoire Maret, Kani Karaca, Sonny Stitt og Roberto Occhipinti. Marsh er eisini ein sera virkin og eftirspurdur maður innan filmstónleik, har hann javnan samarbeiðir við filmstónaskøldunum Hans Zimmer og Harry Gregson Williams. Hann hevur t.d. lagt sítt hegni í filmar sum *Kingdom of Heaven*, *Armageddon*, *Narnia*, *The Number 23*, *Black Hawk Down* og *The DaVinci Code*. Harafturat kann nevnast, at Marsh hevur